## Veðrur vigaði 110 pund

Skopun: Tað var ikki hissini vekt, sum menn í Skopun vórðu vitni til mánakvøldið. Hetta kvøldið varð ein veðrur hjá Bergur Hentze dripin, og vigaði hann 110 pund. Heimasíðan bkv.fo skrivar, at hetta er størsti veðrur sum er dripin í Sandoynni. Krovið var tungt at fáa upp á vektina, men hvat sakar tað, tá ein setur slíkt met.



## Nýggjur leiðari settur á Mørkini

Kristbjørg Toftegaard, sum hevur verið virkandi leiðari á Røktarheiminum á Mørkini síðan 1. februar, er nú sett í starv sum leiðari, boðar Nærverkið frá. Leiðarastarvið fevnir um Røktarheimið á Mørkini, har Kristbjørg fer at hava skrivstovu, og Heimatænastuna í Sundalagnum og á Eiði. Heimasíðan hjá Sunda kommunu skrivar, at við einum felags leiðara fyri Heimatænastuna í økinum og fyri Røktarheimið verða hesar tænastur betri samskipaðar. Fyri viðskiftafólkini fer tað óivað at merkjast sum eitt framstig í teirra gerandisdegi.

# handverkarar



*Á bedingini hjá Tórsahvnar Skipasmiðju standa trý skip uppi í løtuni, Ran (mynd), Thor Provider og ein alibátur. – Nógv virksemi er bæði í Havn, Skála og í Runavík, sigur Gunnar Mohr, stjóri Mynd: Vilmund Jacobsen*

úr eitt nú Ruslandi og Noregi til pólskt skipasmið.

- Tórshavnar Skipasmiðja hevur verið eitt støðugt arbeiðspláss hesi stívliga sjeyti árini, skipasmiðjan hevur verið virkin, og tí hava vit eisini ein góðan "stab" av dugnaligum føroyingum, sum arbeiða hjá okkum, sigur Gunnar Mohr.

Men hetta er ikki nóg mikið til alt tað virksemi, sum er.

**Nýbygningarnir**

Tann fyrri supply-báturin, sum Skipasmiðjan á Skála byggir fyri Thor, verður sambært sáttmálanum latin eigarunum í desember. Hesin stendur nú í dokkini og fer í november niður til Danmarkar til sandblásingar. Hin seinni er strektur í byggihøllini, og verður sambært sáttmálanum latin eigarunum 14. september 2008.

Alibátarnir, sum standa í gerð á Tórshavnar Skipasmiðju, verða latnir eigarunum seinni í hesum árinum.

# 21 dagar uttan mat og drekka

**Hvussu kann ein maður klára seg í einum 12 fót stórur báti úti í Atlantshavinum – við ongum mati og vatni í 21 dagar. Tað letur seg gera. Hetta er søgan um russaran, Valdim Smolyan, eitt prógv um**

**ÍRLAND**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ein løgreglumaður í Írlandi fylgir russaranum, Valdim Smolyan, sum nú verður avhoyrdur í málinum um stjolna bátin*

Herfyri fann írska sjóverjan ein 22 ára gamlan russara, Valdim Smolyan, í einum lítlum báti heilar 210 kilometrar út fyri útsynningsstrondini á Írlandi. Maðurin hevði tá rikist á havinum í 21 dagar – uttan mat og drekka.

Báturin var einans 12 føtur stórur, men hevði kortini klárað at hildið sær omaná sjónum í fleiri lágtrýstum og illveðri í økinum.

Russarin var eftir umstøðunum væl fyri, tá sjóverjan kom fram á bátin, sum hann eftir øllum at døma hevur stjolið í franska býnum Roscoff tíðliga í september.

Men tað var ikki bara sum at siga tað at fáa mannin úr bátinum.

Tá ið sjóverjan kom út á leiðina, hevði hon trupulleikar at samskifta við Valdim Smolyan. Sum skilst, vildi hann treyðugt úr bátinum, men at enda gekk hann við til at koma upp úr bátinum og upp í bjargingarskipið, Le Aisling.

Seinast, vit frættu, bíðaði Valdim Smolyan eftir avhoyring í málinum.

Russarin var eftir umstøðunum ógvuliga væl fyri eftir hesa longu ferð, men hann var ógvuliga svangur og tystur.

Í Írlandi undra tey seg yvir, at maðurin er komin livandi frá hesi ferð – í so lítlum báti og við ongum mati og drekka.

Tað er heimasíðan seilas.no sum ber hesi tíðindi.

# Tryggari fiskiveiða

**Nú skaðarnir umborð á donskum fiskiførum eru minkaðir, er hugsandi, at fiskimenn sleppa við at gjalda minni í trygging**

**DANMARK**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Færri skaðar eru í donsku fiskiskipavinnuni*

Nýggj tøl hjá danska Arbeiðseftirlitinum vísa, at fiskiveiða ikki longur er eitt vandamikið yrki.

Tað eru bara læknar, tannlæknar og fysioterapeutar, sum siga frá smærri skaðum umborð á skipum.

Fiskeri Tidende skrivar, at minkaða talið av skaðum í donsku fiskiskipavinnuni merkir, at gjaldið til sjúkratrygging, sum fiskimenn rinda, kann lækkast.

# Svartfugl á húkin

**Norska Matvøru-eftirlitið hevur heitt á fólk um ikki at fiska í Oslo-fjørðinum, tí vandi er fyri, at svangur svartfuglur tekur húkin**

**NOREG**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað man bara vera í Noregi, at svartfuglur av týdningi kann veiðast við húki*

Einaferð spurdi ein danskur ferðamaður, sum stóð í Vágsbotni og eygleiddi ein mann, sum seldi roytan og svidnan fugl á marknaðinum: "Hvad er det for en fisk...?"

Danin kendi ikki mun á fugli og fiski.

Mangir spurningar kunnu vera undarligir, tá fólk ikki vita betur, og mangar avgerðir um fugl og fisk kunnu tykjast undarligar - sæð við okkara eygum.

Herfyri heitti norska Matvørueftirlitið á fólk um ikki at fiska í Oslofjørðinum, tí vandi var fyri, at svangur svartfuglur tekur húkin.

Nógvir túsund deyðir svartfuglar eru sæddir í Oslo-fjørðinum seinastu tíðina, og norðmenn halda, at fuglurin er "blástur" inn í fjørðin í illveðri, sum var í Skagerak.

Teir fuglar, sum vóru sæddir á lívi í fjørðinum, vóru útmaktaðir og desperatir eftir at fáa fatur á føði.

Beinleiðis orsøkin til, at Matvørueftirlitið heitti á fólk um ikki at fiska í Oslo-fjørðinum, var vandin fyri, at svartfuglurin tekur húkin.

Tað er Fiskaren, sum ber hesi tíðindi úr Noregi.